tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Høgni Mohr, Niclas Johannesen

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Søguligur fundur

***Oddagrein***

Landsfundurin hjá Javnaðarflokkinum hetta vikuskifti er søguligur. Tað er nú í heyst 75 ár síðani, at tey fyrstu javnaðarfeløgini vórðu stovnað, og harafturat er landsfunduri hesuferð opin. Fjølmiðlar eru vælkomnir at siga frá fundinum og tað skuldi verið eitt framstig afturat fyri fólkaræðið í landi okkara.

HUGSJÓNIN um eitt rættvísari samfelag fekk fólk at taka seg saman at stovna javnaðarfeløgini og eini tvey ár seinri varð ringfelagið stovnað. Árið eftir at flokkurin var stovnaður, fekk flokkurin fyrstu ferð tveir mans valdar á ting - Maurentius Viðstein í Suðurstreymou og Petur Mohr Dam í Suðuroy.

SÍÐANI hava fólk flokkast um Javnaðarflokkin, tí hann - fyrst og fremst - virkaði fyri at skapa sosialt rættvísi. Skapa øllum góð kor, sum hevur merkt, at øll skulu hava góðar uppvakstrarmøguleikar, møguleikar at fáa sær útbúgving, seta búgv, hava eitt gott arbeiði og at enda hava tað trygt í ellisárum.

MEN Javnaðarflokkurin hevur alla sína tíð ásannað, at eitt vælferðarsamfelag varð hvørki skipað og bygt út, um búskaparliga grundarlagið ikki var í lagi. Tí hevur Javnaðarflokkurin altíð lagt dent á ein virknan vinnupolitikk, og hevur ofta slóðað fyri á vinnuliga økinum.

Í dag er tjóðskaparspurningurin - framtíðarstøða Føroya - fremsta mál á politisku dagsskránni. Onkur heldur kanska, at onnur mál verða gloymd í einum tjóðskaparligum rúsi, men hann man vera við at renna av nú. Javnaðarflokkurin hevur altíð verið ein flokkurin við nógvum tjóðskaparmonnum, og sjálvstýrismálið tók seg av álvara fram aftur, eftir landsfund Javnaðarfloksins í 1997, tá flokkurin setti seg fyri at fáa Føroyum ein nýggjan sáttmála í danska ríkinum, grundað á hugsjónir floksins um eina sjálvstýrislóg.

TAÐ eydnaðist ikki flokkinum at koma upp í eitt landsstýri á hesum grundarlagi, men kemur ikki nakað ítøkiigt burtur úr næstu sam-ráðingunum um fullveldi, er hugsandi, at tann meiriluti, sum í dag er fyri eini millumloysn - millum heimastýri og fullveldi - fær ta politisku ábyrgdina at fáa ein nýggjan sáttmála við danir um víðkað sjálvstýri, so føroyingar hava evsta vald í øllum yvirtiknum málsøkjum.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Sálamon og skómakarin!!



Fleiri ivaspurningar eru í seinastuni settir við embætisførsluna hjá landsstýrismanninum Helenu Dam á Neystabø, tískil bað løgmaður í gjár tingið um at játtaðar vera kr. 400.000,- til at kanna um hald er í uppáhaldinum um ivasomu embætisførsluna hjá landsstýrismanninum.

Fyri einum hálvum árum síðani var spurnartekin sett við embæltisførsluna hjá landsstýrismanninum í Undirvísingar- og Mentamálum Signar á Brúnni, tí hesin saman við embætismonnum sínum og fíggjarmálastýrinum hevði funnið útvegis fyri at starvsfólkið í Sjónvarp Føroya fekk sína sátt- og lógarbundnu løn fyri arbeiði teirra.

Bjørn á Heygum, Torbjørn Jacobsen, ein útvarpsmaður og Dimmalætting lótu sær ikki siga. Sum eitt annað »gadens parlament« feldi hesi uttan himpr dómin: sekur í lógarbroti móti stýrisskipan Føroya. Vinmenn Signars í tjóðveldisflokkinum og samgongan kundu sjálvandi ikki lata hetta fara afturvið borðinum, tí í komandi tjóðveldinum eigur ikki at vera ivi um rættlyndi landsstýrismann og rættartrygdina í rúmasta týdningi. Tískil fekk Signar durafjóringin og Torbjørn Jacobsen og Che Guevara fluttu inn á skrivstovuna hjá Signari í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Politikkaran Torbjørn Jacobsen vita enn ikki so nógv um, men at Che var idealistur er ivaleyst.

At Signar á Brúnni eftir at vera avsettur sum landsstýrismaður og politiskt likvideraður seinni bleiv fríkendur fyri lógarbrot og reinsaður, var ikki takka verið tjóðveldisflokkinum og løgmanni,m en hóast tjóðveldisflokkin og løgmann.

Møguliga er hetta alt so torskilt, at ilt er at fata rætta samanhangi, men her er okkurt sum skurrar og er kámt fyri vanlig fólk: Tá Torbjørn Jacobsen, Bjørn á Heygum, ein útvarpsmaður og Dimmalætting uttan rættargongd døma Signar, verður hann av tjóðveldisflokkinum og løgmanni gjørdur politiskt æruleysur og sendur til hús, men tá landsstýrismálanevndin setir 19 spurnartekin við um Helena Dam á Neystabø ikki er farin út um sínar heimildir sum landsstýrismaður, fær hon uttan umbøn eina kanning av embætisførslu síni. Í seinastu viku vistu fjølmiðlarnir at siga frá, at tá Helena Dam á Neystabø ikki fekk sín vilja í landsstýrinum, hótti hon við at leggja frá sær, og eitt tvey, so eftirlíkaði løgmaður og samgongan henni. Sostatt er støðan tann, at fyri somu skuldsetingar, verður Signar á Brúnni sendur til hús, meðan Helena ikki uppá vilkor má fara til hús.

Tað sum hetta snýr seg um, er ikki hvørt Helena ella Signar hava gjørt seg sek í hesum ella hasum. Tað, sum hetta snýr seg um, er ikki hvørt Helena ella Signar hava gjørt seg sek í hesum ella hasum, hetta snýr seg um, at her er okkurt sum ikki hongur saman, her er mangul uppá konsikvens. Søgulig spøkilsir – veruleikar og spurningar daga undan: er hetta kollveltingin, ið etur síni egnu børn, er hetta *málið*, sum er so heilagt, at allir midlar eru loyvdir ella er hetta bara! ta, at tað er munur á hattamakaranum og skómakaranum.

**Axel Skoubo**

# Tøkk

Vit takka so inniliga fyri sýnda samkenslu, tá ið høgt elskaða dóttir, systir, ommu- og abbadóttir okkara



**BIRITA MOHR**
í Kollafirði

doyði og varð jarðað.

Vit takka prestunum Marjun Bæk og Bjarna Bæk fyri troystarrík orð á landssjúkrahúsinum, í heiminum og í kirkjuni. Vit takka kirkjutænarum, sangarum og gravarum. Vit takka floksfeløgunum fyri sang í kirkjuni. Takk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávur.

Tøkk tit, ið gjørdu tað møguligt, at so mong kundu fáa drekkamunn í bygdarhúsinum henda dagin. Tøkk grannar og onnur, ið tóku sær so væl av okkum hesar tungu dagar.

Tøkk tit øll, ið fylgdu henn til hennara seinasta hvíldarstað. Hjartaliga tøkk øll somul.

**Leivur, Anna Rúna, Rani, Hildigarð,**
**Durita og Sigrið**
**Ommur og abbar í Vági, Sandavági**
**og í Kollafirði**





# Eysturoyartunnilin sum eitt myrkt kolanám

*Alfred Olsen vónar, at landsst‡risma›urin nú setir eina hóskandi serstaka upphædd av til Eysturoyartunnilin á komandi løgtingsfíggjarlóg, tí har eru tí›arvendar ábøtur ney›ugar*

ÓLAVUR Í BEITI

Alfred Olsen, løgtingsma›ur, hevur sett Bjarna Djurholm, samfer›slumálará›harra, fyrispurning og vil hava at vita, um landsst‡risma›urin er kunnugur vi› trupulleikarnar í Eysturoyartunnlinum? Nær ætlar landsst‡risma›urin at fara undir at loysa trupulleikarnar í tunnlinum? Í hvørji ra›fylgu ver›a arbei›ini gjørd? Og í fjór›a spurningi vil Alfred Olsen hava at vita, nær landsst‡risma›urin ætlar, at arbei›i› í Eysturoyartunnlinum skal vera li›ugt?

Í vi›merkingunum sigur Alfred Olsen, at hvønn einasta dag koyra umlei› 2000 bilar gjøgnum tunnilin, og ta› merkir, at higartil hava umlei› 13 mió. akfør koyrt gjøgnum tunnilin, og fer›slan bara økist. Umframt økingina í persónbilum og vøruvognum, so er tann tunga fer›slan vi› trailarum og stórum lastbilum økt munandi gjøgnum tunnilin hesi seinastu árini og kemur at økjast uppaftur meira, nú so gott sum allur útflutningur skal avskipast í Havn, vi› ta› at bæ›i Norrøna og Eimskip bara brúka Tórshavnar havn.

– Me›an bæ›i Leirvíkstunnilin og Kollafjar›artunnilin eru turrir, ljósir og tryggir og ein frøi at koyra ígjøgnum, so er Eysturoyartunnilin sum eitt myrkt kolanám at koma inn í og koyra ígjøgnum, serliga tá koyrt ver›ur vestureftir, so stórt sæ› lúkar tunnilin neyvan naka› anna› krav enn ta›, at koyrast kann ígjøgnum hann.

### Ry›ur undan loftinum

Og teir serligu trupulleikarnir eru sambært Alfred Olsen, at tuff ry›ur undan loftinum og ni›ur á koyribreytina og kann eisini vera orsøk til, at steinar loysna og detta ni›ur undan loftinum til stóran ampa fyri fer›sluna. Og sjálv koyribreytin fl‡tur í vatni, i› kemur undan loftinum og frá drenunum, serliga í nor›aru sí›u. Og at enda er manglandi ljós og trygdarútger› í tunnlinum, tí sum nú er, hevur tunnilin hvørki ljós ella naka› slag av trygdarútger›.

– Eg havi hoyrt, at kostna›ur av at gera tær mest ney›ugu ábøturnar á tunnlinum er mettur til gó›ar 9 milliónir krónur. Hesin kostna›ur er so miki› stórur, at hann als ikki kann takast av játtanini á fíggjarlógini, sum er avsett til »ábøtur á landsvegin« og tí vóni eg, at landsst‡risma›urin nú setir eina hóskandi serstaka upphædd av til Eysturoyartunnilin á komandi løgtingsfíggjarlóg, sigur Alfred Olsen m.a. í vi›merkingunum.

# Føroyingar líti› kunna›ir um vandan vi› fartelefonum



*Hví ver›ur ikki arbeitt vi› at uppl‡sa almenningin um vandar, sum kunnu standast av at brúka fartelefonir? spyr Jákup Sverri Kass í fyrispurningi*

ÓLAVUR Í BEITI

Er naka› hámark í Føroyum í dag fyri, hvussu nógv SAR (Specific Absorption Rate) ella fartelefongeislavirkni, hvør einstøk fartelefon skal hava? Hví ver›ur ikki arbeitt vi› at uppl‡sa almenningin um vandar, sum kunnu standast av at brúka fartelefonir? vil Jákup Sverri Kass hava at vita frá Bjarna Djurholm, landsst‡rismanni.

Í vi›merkingunum, sigur Jákup Sverri Kass, at ta› hevur leingi veri› frammi, at fartelefonir hava ska›ilig hjáárin á heilsuna hjá brúkarunum. Hjáárin so sum: at n‡tsla av fartelefonum hitar heilan – n‡tsla av fartelefonum ska›ar langtí›ar minni hjá brúkaranum, og at n‡tsla av fartelefonum kann føra til heilasvullir, bló›krabba og Hodgkin's sjúku.

– Serliga í USA eru tey farin í herna í móti vandanum av fartelefonum. Tey hava sett hægstamark fyri fartelefongeislavirkni til at vera 1.6 watt pr. kilogram. Íme›an hægstamarki› í Bretlandi er upp til 10 fer›ir so høgt.

### Hámark á 2 watt

– Serfrø›ingar meta, at hámarki› eigur at liggja á 2 watt pr. kilogram. Ta› eru í Føroyum í dag fartelefonir, sum liggja væl upp í móti tí amerikanska hámarkinum – men einki veit brúkarin. Veruleikin er tann, at føroyingar eru sera líti› kunna›ir um vandan vi› fartelefonum. Flest eingin føroyingur veit, hvat fartelefongeislavirkni er fyri naka›.

Og Jákup Sverri Kass mælir til, at brúkarin fær ein møguleika fyri at kunna seg um vandan, sum kann standast av n‡stlu av fartelefonum. Hetta kann gerast vi›, at landst‡ri› fær til vega kanningarúrslit frá londunum kring okkum og kunnar almenningin til tess at fyribyrgja, at fartelefonir ikki koma at gera ska›a á brúkaran.

– Vónandi fer Føroya landsst‡ri at taka hendan spurning upp og fylgja grannum okkara og uppl‡sa brúkaran betur um hetta n‡ggja tól, sigur Jákup Sverri Kass.



# Eftirlitisstovnarnir skiljast frá umsitingini

*Hvussu kann sama a›alst‡ri› bæ›i ynskja so nógva oljuframlei›slu sum gjørligt og ansa eftir einum so reinum umhvørvi sum til ber? spyr Annita á Frí›riksmørk oljumálará›harran*

ÓLAVUR Í BEITI

Oljumálará›harrin Eltør hevur fingi› tríggjar spurningar frá Annitu á Frí›riksmørk, sum vil hava at vita um oljumálará›harrin heldur, at oljumálst‡ri› kann samskipa ymsar umhvørvisligar, tekniskar og eftirlits uppgávur, sum í dag eru b‡ttar millum øll tey átta a›alst‡rini? Heldur landsst‡risma›urin samstundis, at ney›ugt er, at skilja eftirlit frá umsiting? Og í tri›ja spurningi um landsst‡risma›urin loksins heldur, at umhvørvisdeildin – serliga eftir nevndu samanleggingar – eigur at gerast egi› a›alst‡ri?

### Til taks á sama sta›

Í vi›merkingunum sigur Annita á Frí›riksmørk m.a., at ta› sita í dag fleiri verkfrø›ingar, umhvørvisfrø›ingar og teknikarar av ymsum slagi í ymsu st‡runum og hava ikki tey ambo› av tekniskum slagi, i› eru til taks á hinum deildunum.

– Sótu teir saman í umhvørvismálast‡rinum, so var ta› betri fyri teir og fyri fakdeildirnar, tí alt ta› tilfari›, teir noy›ast at keypa, hev›i komi› deildini til gó›ar, og hev›i veri› til taks á sama sta›i sum onnur teknisk og umhvørvislig vitan hjá landsst‡rinum, sigur Annita á Frí›riksmørk.

### Bá›u megin bor›i›

Og Annita á Frí›riksmørk heldur, at vit høvdu fingi› eina rættiliga »synergieffekt« vi› at savna allar eftirlitsstovnar undir umhvørvismálast‡rinum, sum so eisini átti at veri› skilt frá Oljumálast‡rinum

– Ein sera avgerandi orsøk fyri at skilja eftirlitisstovnarnar frá umsitingini annars er áhugakonfliktin. Hvussu kann sama a›alst‡ri› bæ›i ynskja so nógva oljuframlei›slu sum gjørligt og ansa eftir einum so reinum umhvørvi sum til ber? Hvussu kann sama a›alst‡ri skipa fiskivinnuna, so hon fær sum mest burtur úr fiskastovnunum, og ansa eftir, at ta› ikki ver›ur fiska› ov nógv?

– Hetta er ein órímilig uppgáva at geva einum a›alst‡ri at vera bá›u megin bor›i›. Ta› ræ›ur tí um at flyta eindirnar, so tær rigga best saman, sigur Annita á Frí›riksmørk m.a. í vi›merkingunum.